# Havstovan søkir eftir biologassistenti



## Søkt verður eftir biologassistenti til Botnfiskadeildina á Havstovuni

Viðkomandi skal vera við í dagliga arbeiðinum á Botnfiskadeildini, ið m.a. fevnir um at:

– Aldursgreina fisk og føra dáta á teldu.
– Fara við Magnusi Heinasyni ella øðrum skipum at gera kanningar.
– Gera lívfrøðiligar kanningar av fiski.
– Annað fyrifallandi arbeiði.

Umsøkjarar við áhuga fyri havlívfrøði og kunnleika til føroyskan fiskiskap hava fyrimun. Góð evni at samstarva er ein fortreyt.

**Setanartreytir**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 15. februar 2019.

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Havstovan, Nóatún 1, P.O. Box 3051, FO-110 Tórshavn**
**ella teldupost: hav@hav.fo**

**Nærri upplýsingar** um starvið kunnu fáast við at venda sær til Petur Steingrund, deildarleiðara, teldupost petus@hav.fo ella Eilif Gaard, stjóra, teldupost eilifg@hav.fo, tlf. 35 39 00.

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo